## Úr B36 og út á Argir

26 ára gamli Kenneth Jacobsen, sum alla sína tíð hevur spælt við B36, har hann var liðformaður fyrsta partin av farna kappingarári, skrivaði týskvøldið undir sáttmála við AB. Við heimasíðuna hjá AB ab.fo sigur Kenneth Jacobsen, at hann heldur tað vera sunt at royna okkurt nýtt, og at starvið á trolvirkinum Vónini krevur so mikið nógv, at tað ikki verða stundir at spæla í Formuladeildini. Heimasíðani veit at siga, at ætlanin er, at Kenneth skal spæla á miðvøllinum. Kenneth hevur áður spælt saman við AB venjaranum Allani Mørkøre, og hann sigur seg rokna við, at AB fer at flyta upp aftur næsta ár. Týskvøldið skrivaði AB eisini undir sáttmála við 25 ára gamla Høgna Joensen. Høgni flutti í summar úr HB og út á Argir, og nú hava partarnir skrivað undir uppá, at samstarvið skal halda fram.



## Tór-Ingar til FSV

Um vikuskiftið varð hann heiðraður sum Ársins HB'ari, og nú er greitt, at 26 ára gamli Tór-Ingar Akselsen skiftir felag til næsta kappingarár. Tór-Ingar hevur gjørt av, at hann vil brúka minni tíð til fótbólt, og tí hevur hann valt at sleppa Formulafótbóltinum og fara aftur í Vágarnar at spæla fyri FS Vágar. Hetta skrivar heimasíðan hjá HB. - Tór-Ingar hevur spælt við HB síðan 2002 við undantaki av 2004, tá hann var í Noregi. Hann hevur sostatt verið Føroyameistari við HB tríggjar ferðir, spælt samanlagt 127 dystir og skorað 27 mál, skrivar heimasíðan hjá HB.

# Spenningur frá fyrsta leiki

**Fyrra innleiðandi FM kappingin í talvi fyri ung 2007, var í Vestmanna leygardagin.50 børn og ung møttu til kappingina.**

TALV
*Tíðindaskriv*

Kappingin er skipað í 5 aldursbólkum: Upp til 10 ár (f. 1997 og yngri), 11-12 ár (f.1995/96), 13-14 ár (f.1993/94), 15-16 ár (f.1991/92) og 17-20 ár (f.1988/90). Elsti bólkurin telvar bert finaluna.

Umframt at verða FM kapping í hvørjum aldursbólki sær, er talan samstundis um úttøkukapping til NM í talvi, sum verður í Danmark í februar mánað 2008. Føroyameistarin og nr. 2 í hvørjum aldursbólki vinna sær rætt til luttøku í Norðurlendsku kappingini. Føroyar sendur - eins og seinnu árini - fulla manning, 10 telvarar, til kappingina - á jøvnum føti við hini norðurlondini.



*Í fleiri bólkum var spenningurin heilt stórur. Og onkra staðni skuldi umdystur til, áðrenn vinnarin varð funnin*

### U16: Røgvi E. Nielsen ovastur eftir umdyst

Talan gjørdist um eina sera spennandi kapping ímillum teir sjey telvararnar sum høvdu meldað seg til fyrru innleiðandi kappingina í U16 bólkinum. Sera royndu unglingatelvararnir staðfestu tað, sum væntast kundi frammanundan: Í royndini eru allir møguleikar opnir í FM stríðnum. Tvífeldur umdystur varð neyðugur til tess at staðfesta endaligu plaseringarnar. Tá avtornaði varð Røgvi E. Nielsen úr Sandavági ovastur, meðan Vagnur Dam úr Sundalagnum gjørdist næstur eftir umdyst við Røgva. Hjalti T. Jógvansson og Margar Berg telvdu um bronsuna og var Margar drúgvari og vann umdystin. Undanfarin ár hava Hjalti og Røgvi ligið ovastir tá avtornaði, men í 2007 er bólkurin enn meir spennandi enn nakrantíð.

### U14: Heiðrikur T. Jacobsen stavnin fremri

Seks telvarar meldaðu luttøku í U12 bólkinum til fyrru innleiðandi FM kappingina. Undan kappingina vóru Heiðrikur T. Jacobsen og Rúni Vørmadal uttan iva greiðir favorittar, at vinna kappingina. Heiðrikur fullførdi setningin, men Pætur Poulsen úr Skopun gjørdi rættiligt hol í sjógvin - telvdi sera væl og vann 2. plássið frammanfyri Rúna Vørmadal og gullinum. Óvæntað og nakað sensationelt úrslit av Pæturi, nú hetta var hansara fyrsta kapping í unglinga FM-høpi fyri einstaklingar.

### U12: Einar Gregersen - fult stigatal !

U12 bólkurin var merktur av einum sera spennandi stríði ímillum brøðurnar Einar og Heðin Gregersen, úr Klaksvík, umframt, at Johan Hentze somuleiðis, sum væntað varð, eisini gjørdi um seg í oddastríðnum. Tá avtornaði vann Einar sera sannførandi við fullum stigatali, meðan Johan Hentze skoraði seg uppímillum brøðurnar og gjørdist næstur. Heðin vann bronsuna. 15 telvarar luttóku og harímillum fleiri aðrir royndir telvarar, eitt nú, Sára T. Olsen, Rúni T. Jacobsen og Janus E. Nielsen, sum saman við hinum spennandi (nýggju) kreftunum, fara at geva vinnarunum hesuferð, ein skarpan gang, sum kappingin líður.

### U10: Høgni E. Nielsen ósvitaliga tryggan sigur !

Undirtøkan var hugaliga góð hjá teim yngstu telvarunum - U10 bólkinum. 22 luttakarar stríddust sera hugagóðir í kappingini, sum varð myndað við royndum telvarum, umframt fleiri yngri "nýggjum" telvarum, eitt nú úr Sundalagnum. Stórfavoritturin at vinna kappingina var Høgni Egilstoft Nielsen úr Sandavági. Hóast unga aldurin, hevur hann verið FM vinnari og NM luttakari í fleiri umførum. Og hann greiddi setningin til fulnar: Fult stigatal - uttan tap í 8 talvum. Hinvegin sýnist kappingin um hinar plaseringarnar opin, nú fleiri telvarar, í mun til undanfarna ár, eru fluttir upp í eldri aldursbólk. Vestmennadreingirnir - Alfred og Bárður Olsen - stóðu seg best í hesi kappingini sunnudagin. Men beint í hølunum er ein riðil av telvarum, sum bjóða seg fram til seinnu innleiðandi kappingina í Sandavági.

Seinna innleiðandi kappingin verður í Sandavági komandi leygardag 10. november. Eftir seinnu kappingina, verður drigið saman um, og tey átta, sum samanlagt hava staðið seg best í hvørjum aldursbólki, luttaka í FM finaluni, sum verður í Argja skúla, leygardagin 24. november. Tað er onki til hindurs fyri, at luttaka í kappingini í Sandavági, um einum barst undan at vera við í Vestmanna. Tilmeldingarfreistin er hóskvøldið - sí nærri á: www.faroechess.com.

| Bólkur B: U16 - (telvarar føddir 1991/92) | | |
|---|---|---|
| 1 | Røgvi Egilstoft Nielsen (Sandavág) | 4,5 |
| 2 | Vagnur Dam (Rókur) | 4,5 |
| 3 | Margar Berg (Havn) | 4,0 |
| 4 | Hjalti Toftum Jógvansson (Havn) | 4,0 |
| 5 | Bogi Hansen Eliasen (Klaksvík) | 3,0 |
| 6 | Jóhann Rói Mortensen (Rókur) | 1,0 |
| 7 | Borgar Jónsson Stórá (Vestmanna) | 0,0 |

| Bólkur C: U14 - (telvarar føddir 1993/94) | | |
|---|---|---|
| 1 | Heiðrikur T. Jacobsen (Havn) | 4,5 |
| 2 | Pætur Poulsen (Skopun) | 4,0 |
| 3 | Rúni Vørmadal (Vestmanna) | 3,5 |
| 4 | Jógvan Emil Joensen (Vestmanna) | 2,0 |
| 5 | Bárður Jónsson Stórá (Vestmanna) | 1,0 |
| 6 | Theodor Larsen (Rókur) | 0,0 |

| Bólkur D: U12 - (telvarar føddir 1995/96) | | |
|---|---|---|
| 1 | Einar Gregersen (Klaksvík) | 8,0 |
| 2 | Jóhan Hentze (Havn) | 7,0 |
| 3 | Heðin Gregersen (Klaksvík) | 6,0 |
| 4 | Sára Traber Olsen | 5,0 |
| 5 | Rúni Jacobsen | 4,5 |
| 6 | Janus Egilstoft Nielsen | 4,0 |
| 7 | Jóannes Hansen | 4,0 |
| 8 | Sølvi Egilsson | 4,0 |
| 9 | Pætur Magnussen | 4,0 |
| 10 | Teitur Thorleifsson | 3,5 |
| 11 | Eli Johannesen | 3,5 |
| 12 | Torkil Jespersen | 3,5 |
| 13 | Eydna Andreasen | 3,0 |
| 14 | David Henriksen | 2,0 |
| 15 | Hørður Hentze Johansen | 2,0 |

| Bólkur E: U10 - (telvarar føddir 1997 ella seinni) | | |
|---|---|---|
| 1 | Høgni Egilstoft Nielsen (Sandavág) | 8,0 |
| 2 | Alfred Olsen (Vestmanna) | 6,5 |
| 3 | Sjúrður Olsen (Vestmanna) | 6,0 |
| 4 | Tóki Johannesen | 5,5 |
| 5 | Dánjal K. Hansen | 5,0 |
| 6 | Leivur í Buð Justinussen | 4,5 |
| 7 | Julian Gregersen | 4,5 |
| 8 | Jógvan Eli Debes | 4,5 |
| 9 | Magnus Reinert Hansen | 4,0 |
| 10 | Uni Gregersen | 4,0 |
| 11 | Jákup á Røgvi | 4,0 |
| 12 | Sólfríð Hjørleifsdóttir | 4,0 |
| 13 | Súsanna Jacobsen | 4,0 |
| 14 | Silas Eyðsteinsson | 3,5 |
| 15 | Fríði Potts | 3,0 |
| 16 | Flóvin Hans Jógvansson | 3,0 |
| 17 | Tóri Nielsen | 3,0 |
| 18 | Kaj Johannesen | 3,0 |
| 19 | Hørður Egilson | 2,5 |
| 20 | Valborg Jacobsen | 2,5 |
| 21 | Heini á Heygum | 2,0 |
| 22 | Ólavur Weihe Joensen | 1,0 |